# Kjak



**Rósa Samuelsen**
*landsstýriskvinna*

## Vil stríðast fyri eini heildarætlan fyri sinnisveik

Verandi tilboð til sinnisveik, bæði hvat viðvíkur bústaðartilboðum og aktivitetstilboðum, eru als ikki nøktandi. Tí hevur í langa tíð verið arbeitt við at gera sambýli til tey, sum nú búgva á Psykiatriska deplinum. Men Tórshavnar Kommuna hevur sagt, at áðrenn henda ætlan kann setast í verk, má landið gera heildarætlan fyri alt økið við Landssjúkrahúsið, og tí er Tórshavnar Kommuna ikki klár at geva byggiloyvi. Kommunan hevur heldur ikki annað stykki at vísa á. Aðrar kommunur hava harafturímóti bjóða stykki fram – onkur enntá ókeypis.

Grundað á hesa støðu ráðførdi eg meg, í juni mánaði, við bygginevndina, ið skal taka sær av ætlaðu bygginini. Í nevndini sita umboð fyri Almannamálaráðið, Sinnisbata, Psykiatriska depilin og Nærverkið. Á fundinum varð spurningurin um at byggja uttanfyri Havnina viðgjørdur.

Bygginevndin mælti til, at bygt varð í størri bygd ella býi við góðum ferðasambandi, og at góðir arbeiðsmøguleikar vóru hjá búfólkunum. Eisini var umráðandi at hava góðar skúlamøguleikar, møguleikar fyri rørslu og at bústovnurin varð bygdur so nær øðrum fólki sum til bar. Avgerðin um at kanna møguleikan at byggja í Sandavági er gjørd við støði í hesum tilmælinum.

Vágoyggin hevur øll hesi nevndu tilboðini. Við at byggja í Vágoynni, ber til at skapa ein vælvirkandi depil, við møguleika fyri at samskipa ymsu tilboðini. Annað tilmæli var eisini á borðinum, men helt eg sjálv at tað ikki livdi upp til tilráðingina, sum bygginevndin mælti til.

Eg eri ógvuliga hørm um, at umrøðan av málinum til tíðir hevur fingið eina heldur neiliga viðgerð. Ætlanin hevur ongantíð veri at tvangsflyta nakran til Vágarnar. Talan er um uppá longri sikt at veita eitt heildartilboð til sinnisveik.

Tey sinnisveiku, sum eru liðug við sína viðgerð á psykiatriska deplinum, og sum eru klár at verða flutt út í sosial psykiatriina fáa sjálvandi í boði at flyta.

Ætlanin um at byggja eitt sambýli í Havn, er ikki slept, men má tó bíða til byggiloyvi fyriliggur frá Tórshavnar kommunu. Ætlanin um at byggja sambýlið í Sandavági, hevur enn bert verið til hoyringar, og er tí ikki viðgjørt í politisku skipanini.

Ætlanin, ið eg arbeiði við, kann gera tað møguligt at geva teimum sinnisveiku og teimum menningartarnaðu hvør sítt verkstaðstilboð. At nú limir í samgonguni, alment, áðrenn politisku viðgerðina, geva til kennar, at ikki verður tikið undir við ætlanini, er sera óheppið. Hetta kann forða fyri, at viðurskiftini hjá sinnisveikum verða betrað í nærmastu framtíð, og kann somuleiðis verða orsøk til, at sinnisveik og menningartarnað framhaldandi verða noydd at vera á sama verkstaði, hóast tað als ikki er nøktandi.

---



**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri*

## Tilboð til Rósu Samuelsen landsstýriskvinnu

*Kjakið seinastu tíðina, um ætlanina hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum at flyta byggingina av bústaðum til sinnisveik við Heygsvegin í Havn til Sandavágs, avdúkar í veruleikanum landsstyriskvinnuna*

**Tað er staðfest**

- at landsstýriskvinna ikki lurtar eftir læknafakliga serkunnleikanum á økinum
- at landsstýriskvinnan hevur ikki sagt satt um góðkenning frá Sinnisbata
- at Almannamálaráðið sjálvt bað kommununa bíða við viðgerðini hin 29. juni 2010 og skuldi síðani lata kommununa hoyra aftur, men at Almannamálaráðið ongantíð lat frætta frá sær aftur
- at landsstýriskvinnan hevur ikki sagt satt um, at Tórshavnar kommuna seinkar verkætlanini, og brúkar viðmerkingar um atkomuveg og heildarætlan sum umbering fyri at flyta byggingina til heimbygd sína
- at landsstýriskvinnan brúkar skeivar grundgevingar í viðmerkingunum til uppskotið um lógarbroyting, um hví bústaðirnir skulu flytast til Sandavágs
- at landsstýriskvinnan óbeinleiðis tykist eggja kommunum uttanfyri Havnina til at bróta lógina um avhending av kommunalari fastogn við at grundgeva við, at aðrar kommunur vilja lata lendi ókeypis ella bíliga (tað má verða undir marknaðarprís). Landsstýrið hevur í øðrum málum kravt at Tórshavnar kommuna avhendir lendi til marknaðarprís, so tað má eisini galda Sandavág og aðrastaðni.

Nú eigur landsstýriskvinnan at gevast við øllum uttanumtosi og viðgera hetta málið í størri álvara enn higartil. Og landsstýriskvinnan eigur at flyta sítt fokus frá bert at røkja sitt politiska heimabeiti til at seta fokus á teir sinnisveiku brúkararnar og teirra tørv.

Tórshavnar kommuna vil tí geva landsstýriskvinnuni Rósu Samuelsen tilboð um at loysa málið. Tað kann vera á økinum við Heygsvegin, aðrastaðni i Havnini ella i Kollafirði, um tað er tydningarmikið fyri landsstyriskvinnuna, at tað er á bygd. Landsstýriskvinnan kann sjálv velja, hvørjum av ymsu møguleikunum hon ynskir at taka av:

**1.** Tórshavnar kommuna stendur við longu givna tilboðið um at avtala eitt útreiðslubýti fyri atkomuveg til økið við Heygsvegin

**2.** Tórshavnar kommuna býður sær til sjálv at gera uppskot til heildarætlan fyri økið eystanfyri Heygvegin innan í mesta lagi 2 mánaðar, um landsstýrið ikki sjálvt megnar hetta

**3.** Almannamálaráðið hevur sjálvt valt staðsetingina við Heygsvegin, og kommunan góðkennir hesa staðseting

**4.** Um Almannamálaráðið ynskir aðrar staðsetingarmøguleikar í Tórshavnar kommunu, so vil kommunan fegin hjálpa til við hesum, antin á landsjørð, sum so hevði verðið ókeypis fyri Almannamálaráðið, ella við at Almannamálaráðið keypir hóskandi lendi frá kommununi ella privatum.

**5.** Landið eigur 3 hagapartar við tilhoyrandi innangarðsjørð kring Havnina, umframt nógv lendi í Kollafirði.

Tað er bara at koma í gongd, Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna!